

# Gullvinnarin stúrir fyri fimleikinum

**Nú fimleikurin varð vrakaður til Oyggjaleikirnar á Rhodos í 2007, stúrir Helgi Winther Olsen fyri, at menningin innan fimleikin kann steðga fullkomiliga upp. Okkurt má gerast fyri sleppa undan einum bakkkasti innan fimleikin, heldur hann**

FIMLEIKUR
*Eyðun*
*eydun@sosialurin.fo*

**Scalloway:** Ein ítøkiligur vandi er fyri, at føroyskur fimleikur fullkomliga steðgar upp, nú fimleikur reyk út av næstu Oyggjaleikunum, sum verða á Rhodos um tvey ár.

Tað heldur fimleikarin Helgi Winther Olsen, sum mikudagin vann tvey gullmerki í einstaklinga fimleiki.

– Tað er ótrúliga keðiligt, at vit ikki verða við á næstu Oyggjaleikunum. Vit hava verið í støðuni fyrr, og tað merkti fyri fimleikin í Føroyum ta tíðina, tí tað var eitt ella annað slag av manglandi fokus í fimleikinum, sigur hann.

– Vit fingu líkasum gongd á føroyska fimleikin á Oyggjaleikunum í 1999, og á Isle of Man tóku vit eina rúgvu av heiðursmerkjum. Nú vísir tað seg sum, at menningin hjá okkum er steðgað eitt sindur, og fleiri av fimleikarunum eru ikki viðaftur.

– Spurningurin er so, hvat tað fer at merkja fyri okkum, at vit ikki verða við á næstu Oyggjaleikunum. Eg stúri fyri, at tað fer at merkja ein steðg fyri føroyskan fimleik.

## Alternativ kapping

Ber tað ikki til at verða við í øðrum altjóða kappingum, nú tit ikki sleppa við til Oyggjaleikirnar?

– Jú, tað ber til at taka lut í nógvum altjóða kappingum, men sjarman við Oyggjaleikunum er, at her kunnu vit gera okkum galdandi. Her kunnu vit vinna nakað, og her kunnu vit gera ein mun. Vit luttaka í fleiri altjóða kappingum, men á Oyggjaleikunum eru vit nakað samanborið við hini, tað eru vit ikki í teimum stóru og sterku altjóða kappingunum, sigur Helgi Winther Olsen.

– Tað, sum eg síggi sum tað mest spennandi alternativið til Oyggjaleikirnar, er, at vit í Føroyum bjóðaðu okkum til at hava eina kapping í fimleiki fyri allar oyggjarnar, sum plaga at taka lut á Oyggjaleikunum. Eitt slag av mini-Oyggjaleikum í fimleiki.

– Meðan vit fyrireika okkum til eina slíka kapping, skulu vit fáa umstøðurnar at venja og kappast í upp á pláss. Vit skulu gera tað prosessina, sum byrjaði við tí fyrsta gullinum í fimleiki á Gibraltar, lidna við at fáa okkara umstøður góðar, so vit kunnu útnytta kapasitetin, sum vit eiga heima og í útlandinum.

## Annað fyllir meira og meira

Helgi Winther Olsen er 24 ára gamal, og hann er longu ein royndur fimleikari við nógvum sigrum og heiðursmerkjum aftan fyri seg.

– Mær dámar væl at venja fimleik, og eg geri tað fyrst og fremst, tí eg tími tað. Eg ætli mær at halda fram við at venja fimleik, tí tað er ein partur av mínum. Hvussu tað verður við kappingum, veit eg ikki. Eg lesi ítrótt og geri bachelor-uppgávuna í løtuni. Tá ið eg havi fingið bachelor-gradina ætli eg mær at skifta yvir at lesa verkfrøði innan medisin og teknologi, og tað er krevjandi.

– Eg kappist niðri, og tað ætli eg mær at halda fram við. Um heystið plagi eg at kappast í eini liðkapping, og tað brúki eg sum fyrireiking til einstaklingakappingar um várið. Eg ætli mær at halda fram við at verða við á liðnum í Aalborg, og vit vilja sera fegnir vinna eina kapping, tað hava vit ikki roynt enn.

– Men eg má viðurkenna, at tað eru nøkur onnur ting, sum fylla meira og meira. Eg leggi minni orku í at venja, og tað sæst aftur á úrslitinum. Tað er eitt sindur løgið at siga í dag, nú eg havi vunnið tvær gullmedaljur, men eg eri ikki við í øðrum reiðskapsfimleiki, og onkrastaðni, har eg gjørdi meg galdandi fyrr, geri eg meg ikki galdandi longur.

## Fimleikurin kann fáa stórar trupulleikar

Fimleikur verður ikki við á Oyggjaleikum aftur fyrr enn í fyrsta lagi um fýra. Spurningurin er so, um hetta var endabresturin hjá Helga Winther Olsen í Oyggjaleikasamanhangi.

– Tað ber ikki til at siga, hvussu tað verður um fýra ár. Tað veldst um, hvussu mín privata støða verður tá. Høgni, sum eisini vann medaljur í dag, er 33 ára gamal, og eg verði 25 nú. Men tað er sera krevjandi í løtuni at skulu seta alt annað til síðis fyri fimleikin.

– Mítt persónliga mál hevur verið og er framvegis, at fimleikurin skal koma betur fyri seg. Hetta snýr seg ikki bara um meg, men um fimleikin sum heild. Tað eru framvegis eg og Høgni, tveir gamlir gubbar, meðan nógvir av hinum fimleikarunum als ikki eru við longur.

– Vit hava tveir ungar fimleikarar við hesaferð, men teir eru eisini rættiliga einsamallir, so tað er ikki nógvur fimleikur. Og eg eri bangin fyri, at tað verður ein total stagniatión, nú vit ikki skulu við til næstu Oyggjaleikirnar. Okkurt má gerast, um menningin skal halda fram, sigur Helgi Winther Olsen.



*Høgni Øster vann silvur og bronsu*